FØROYA **POLITI**

# 1. juni 2022 kemur nýggja neyðtøkuásetingin í revsilógini í gildi

**Nýggja ásetingin í § 216, stk. 1 í revsilógini um neyðtøku staðfestir at samlega við ein persón, sum ikki samtykkir til tað, er neyðtøka.**

Sambært ásetingini skal samtykkið vera komið til sjóndar við orðum ella gerðum ella síggjast í tí ítøkiligu støðuni og høpinum. Í hesum liggur, at samtykkið skal vera sjálvboðið og sýna viljan hjá viðkomandi. Tað er t.d. ikki sjálvboðið, um gerningsmaðurin hevur noytt annan til samlegu við harðskapi ella hóttan um harðskap.

Í viðmerkingunum til lógarbroytingina stendur m.a., at hildið verður, at broytingin fer at elva til hugburðsbroyting, tí hon varpar ljós á at virða mørkini og frælsið hjá okkara medmenniskjum umframt rættin til at ráða yvir egnum kroppi.

Lógarbroytingin, sum kemur í gildi 1. juni 2022, hevur eisini við sær, at revsingin fyri m.a. neyðtøku í útgangsstøðinum skal herðast.

Fyri at stuðla undir kjaki hevur Føroya Politi hugt nærri at málum um kynslig brotsverk[1], sum eru skrásett hjá politinum í tíðarskeiðnum 1. januar 2018 til 25. mars 2022.

## Lógarbrot

Tað eru skrásett í alt **59 lógarbrot** við sjálvstøðugum málsnummari. Fleiri lógarbrot kunnu tó undir málsviðgerðini verða knýtt saman í eitt mál, og tí ber ikki til út frá hesum at staðfesta, at talan er um 59 ymiskar gerningspersónar ella 59 ymisk órættaði.

| Fráboðan til politiið<br>-tíð fráliðin síðan brot | Lógarbrot | Dømd | Fríkend | Ákæru-frágangur | Kanning steðgað | Áleikandi |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Upp til 5 tímar | 11 | 4 | 0 | 3 | 2 | 2 |
| 5-12 tímar | 5 | 1 | 1 | 0 | 1 | 2 |
| 12-24 tímar | 1 | | | 1 | | |
| Upp til 3 døgn | 6 | 4 | 0 | 0 | 0 | 2 |
| 3 døgn - 1 viku | 9 | 3 | 0 | 2 | 2 | 2 |
| 1 viku - 1 mðr. | 6 | 2 | 0 | 0 | 1 | 3 |
| 1 til 6 mðr. | 8 | 2 | 1 | 3 | 0 | 2 |
| 6 mðr. til 1 ár | 3 | 0 | 1 | 0 | 0 | 2 |
| Yvir 1 ár | 9 | 1 | 1 | 2 | 2 | 3 |
| Ógreitt | 1 | | | | | 1 |
| **Í alt** | **59** | **17** | **4** | **11** | **8** | **19** |

**Talva 1** omanfyri vísir yvirlit yvir, hvussu long tíð er gingin frá, at lógarbrotið er framt til, at tað verður meldað til politiið. Fyri at tryggja teknisk prógv, undir hesum DNA ella fysisk tekin á órættaða el.tíl., er tað av týdningi, at órættaði verður kannað/ur innanfyri stutta tíð eftir, at brotið er framt. At eingin fysisk prógv eru, kann hava týdning fyri, um próvbyrðan kann lyftast.

Talvan vísir harumframt, um og hvussu málini eru avgreidd.

*[1] Uppgerðin er grundað á mál, sum eru skrásett við hesum gerningskotum 72222, 72236, 72301, 72305, 72333 í journalskipanini NIFLHEIMR. Hetta fevnir um brot á §§ 216, 217 (áður galdandi) og 218.*

## Gerningsstaður




## Aldursbýti




**Talva 2** vísir, at flestu lógarbrotini henda í privatum heimum. Í flestu førum er hetta heima hjá gerningspersóni ella órættaða. Hetta kann vera ein ábending um, at gerningspersónur og órættaði í nógvum førum kenna hvønn annan.

Hetta er stuðlað av tølunum, sum vísa, at í 10 førum var upplýst, at talan var um fólk í parlagi ella sum høvdu verið í parlagi, og at tað í 26 førum var upplýst, at talan var um vinir, kenningar ella familjulimir. Í 5 førum er upplýst, at gerningspersónur og órættaði ikki kennast.

**Talva 3** vísir aldursbýti á ávikavist gerningspersónum og órættaðum. Talvan vísir, at 35 órættaði eru undir 20 ár, meðan 23 eru 21 ár ella eldri. Fleiri enn 75 % av órættaðu eru undir 25 ár.

Aldurin á gerningspersónunum er meira javnt býttur, tó at 85 % eru yngri enn 35 ár. Gev gætur, at tað í samband við nøkur av teimum 59 lógarbrotunum eru fleiri enn ein gerningspersónur, meðan tað í øðrum málum ikki er staðfest, hvør gerningspersónurin er.

Av teimum 59 lógarbrotunum, eru 21 viðgjørd av dómstólunum. Tey 21 lógarbrotini vóru savna í 14 ymisk mál ímóti 14 ymiskum gerningspersónum. Í 3 málum var niðurstøðan fríkenning. Í 11 málum bleiv gerningspersónurin dømdur.

Í yvirlitinum niðanfyri er yvirlit yvir, hvør revsingin var í málunum. Gev gætur, at onnur lógarbrot, t.d. brot á reglurnar um rúsandi evni, hava verið partur av onkrum máli. Legg eisini merki til, at í tveimum málum er gerningspersónurin fríkendur fyri brot á ávikavist § 216, stk. 1, nr. 1 og § 218, men dømdur eftir øðrum ásetingum.

## Revsing

| |
|---|
| Fongsul í 5 mánaðar (treytað)* |
| Fongsul í 1 ár og 6 mánaðar (treytað)* |
| Fongsul í 3 mánaðar, av hesum 30 dagar treytaleyst |
| Fongsul í 1 ár og 3 mánaðar* |
| Fongsul í 2 ár og 3 mánaðar* |
| Fongsul í 8 mánaðar* |
| Fongsul í 50 dagar (treytað) |
| Fongsul í 1 ár og 9 mánaðar* |
| Fongsul í 10 mánaðar* |
| Fongsul í 10 mánaðar* |
| Fongsul í 1 ár (kært)* |
| Fongsul í 11 mánaðar (kært)* |

**Gerningspersónurin er dømdur fyri brot á §§ 216, 217 (áður galdandi) ella 218.*